# Tí mjøður var uppi...

**Tað vóru ikki fáir litrar av øli, ið gliðu niður um skotsku gómarnar dagarnar upp undir landsdystin móti Skotlandi**



*Ølkuskarnir hjá Føroya Bjór hava havt úr at gera, meðan skotarnir hava vitjað landið*

LANDSDYSTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var heilt óvanligt í gjár. Sum á Ólavsøku!

Tað sigur stjórin á Føroya Bjór, Einar Waag, nú einir 1100 skotskir fótbóltsáskoðarar hava vitjað landið seinastu dagarnar.

Tað er ein ótrúliga stórur munur á, tá skotar koma á vitjan og so tá aðrar tjóðir vitja. Seinasta vikuskiftið var italska landsliðið á Tórsvølli, og í tí sambandi var nakað av áskoðarum komið til Føroya. Men tað merktist als ikki á ølsøluni, tað var einki øðrvísi enn eitt vanligt vikuskifti. Hetta hóast 12. maður seldi nakað væl av øli í tjaldinum við Gundadalshøllina.

Seinastu dagarnar hevur støðan verið ein heilt onnur. Longu tíðliga seinnapartin í gjár var uppi við kaggunum úti í Havnardali, og tað hevur verið nærmast panikkur í á tapparínum í Klaksvík at fylla kaggarnar aftur.

- Tað hevur verið størri panikkur enn á Ólavsøku. Vit hildu okkum vera fyrireikað upp á hetta, men tað vísti seg, at tað vóru vit ikki til fulnar, sigur stjórin á Føroya Bjór.

## Jubla um Skotland

A bryggjaríinum í Klaksvík hava tey sum nevnt royndt at fyrireika seg, eitt nú við at vera væl fyri við Staut-øli, men tað vísir seg, at tað er verðaølið, ið verður nógv mest drukkið.

- Tað vísir seg, at skotar drekka ikki so nógv av sterkum øli. Eg dugi ikki heilt at siga, hvussu tað er í Skotlandi, men eg veit, at í Suðuronglandi er tað ølið, ið verður tappað úr kranunum, veikari enn verðaølið, um eini 3%, haldi eg, sigur Einar Waag.

Skotar hava sum kunnugt verið í Føroyum fyrr í sambandi við landsdystir, og tað er sama søgan hvørja ferð. Teir koma í góðari tíð, og í flestu førum taka teir hetta sum ein mannfólkatúr burturav. Tað merkir, at teir koma at hugna sær, og teir eru eisini stak friðarligt og fyrikomandi fólkaslag.

So tað er einki at siga til, at barreigarar jubla, tá Føroyar draga Skotland í einari undankapping í fótbólti, sigur Einar Waag, sum ikki hevur nøkur endalig tøl fyri, hvussu nógv øl er flýggjað um diskarnar hesar seinastu dagarnar.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin og leygardagin:**
Fleyr til gul av eystri og landsynningi, turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 12 og 16 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og eystri, turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Nakað sama veðrið sum sunnudagin.

Mai mánaði bleiv turrari og kaldari enn miðal. Miðalhitin bleiv 6,5 stig ímóti 7,0. Avfallið 49 mm ímóti 71,5 í miðal.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 12 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 16 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 22 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 25 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 27 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 22 |
| Malorca | -- |
| Athen | 25 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 14 |
| New York | 21 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 25 |
| Panama | -- |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1030 hPa. yvir Norska Havinum stendur mestsum í stað og viknar nakað.




**Í dag:**
Hátrýstið yvir Norska Havinum stendur framvegis í stað og gevur væntandi góðveður á okkara leiðum komandi dagarnar

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 6/6 kl. 06[00] – 7/6. 06[00]. Hitin í gjár: 9,4°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 6/6 kl. 06[00] – 7/6 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juni: 3,0 mm


**Tiltøk í Miðlahúsinum í juni**




- altíð eitt tiltak miðlahúsinum

**12. juni kl. 19**
**Málaratiltak**

**14. juni**
**Blóðgevarafelagið**

**27. juni kl. 21**
**Summartónar**


## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 27. mai | Mánin longst frá jørðini |
| 1. juni | Fullmáni |
| 8. juni | Seinna kvarter |
| 12. juni | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. Juni | 00.01 | 12.22 | 11.22 | 23.57 | 11.37 | - | 02.01 | 14.22 | 03.01 | 15.22 | 10.37 | 23.12 | 09.37 | 22.12 | 00.16 | 12.37 | 01.16 | 13.37 | - | 12.07 | 01.01 | 13.22 |
| 8. Juni | 00.57 | 13.32 | - | 12.32 | 00.12 | 12.47 | 02.57 | 15.32 | 03.57 | 16.32 | 11.47 | - | 10.47 | 23.21 | 01.12 | 13.47 | 02.12 | 14.47 | 00.42 | 13.17 | 01.57 | 14.32 |
| 9. Juni | 02.06 | 14.41 | 01.06 | 13.41 | 01.21 | 13.56 | 04.06 | 16.41 | 05.06 | 17.41 | 00.21 | 12.56 | 11.56 | - | 02.21 | 14.56 | 03.21 | 15.56 | 01.51 | 14.26 | 03.06 | 15.41 |
| 10. Juni | 03.02 | 15.23 | 02.02 | 14.23 | 02.17 | 14.38 | 05.02 | 17.23 | 06.02 | 18.23 | 01.17 | 13.38 | 00.17 | 12.38 | 03.17 | 15.38 | 04.17 | 16.38 | 02.47 | 15.08 | 04.02 | 16.23 |
| 11. Juni | 03.45 | 16.08 | 02.45 | 15.08 | 03.00 | 15.23 | 05.45 | 18.08 | 06.45 | 19.08 | 02.00 | 14.23 | 01.00 | 13.23 | 04.00 | 16.23 | 05.00 | 17.23 | 03.30 | 15.53 | 04.45 | 17.08 |